# Útgerðin hjá Scorpions er komin

**Ein trailari fullur av forsterkarum, ljóðførum og øðrum, ið Scorpions skal brúka til framførsluna á Summar Festivalinum fríggjakvøldið, kom í morgun til Klaksvíkar**

**SUMMAR FESTIVALUR**
*Tíðindaskriv*

Tað verður ikki spart upp á krútið, tá ið heimskendi týski rockbólkurin Scorpions fer at spæla á Summar Festivalinum fríggjakvøldið.

Í morgun rullaði ein stórur trailari inn á festivaløkið við Vágsbø. Í trailaranum er útgerð, sum Scorpions skal brúka til framførsluna fríggjakvøldið. Í trailaranum eru nógvir gittarar hjá teimum báðum gittarspælarunum í bólkinum, trummusettið, onnur ljóðføri, forsterkarar til gittarar, bass og nógv onnur útgerð.

Tíðliga hósdagin koma bæði tónleikararnir og crew hjá Scorpions til landið, og tá verður alt sett upp til helst størstu rockkonsert í Føroyum nakrantíð.




## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útsynningi, seinnapartin minni vindur av vestri. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, seinnapartin minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fyrrapartin lot av ymsum ættum, turt og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind av suðri og regn. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og útsynningi. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 10 og 14 stig.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 9 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 7 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 1 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 17 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 12 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 18 |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 17 |
| Moskva | 24 |
| Berlin | 17 |
| Warzawa | 18 |
| Kiev | 20 |
| Bukarest | 33 |
| Paris | 20 |
| Madrid | 35 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 34 |
| Malta | 33 |
| Tunis | 33 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 14 |
| New York | 25 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 31 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 12 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 991 hPa. við Ísland fer spakuliga eystureftir og brúgvalagið við Føroyar fer í landnyrðing.




**Í dag:**
Lágtrýstið skamt norðan fyri Føroyar fer spakuliga eystureftir og brúgvalagið við Føroyar fer somuleiðis eystureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 29/7 kl. 06[00] – 30/7. 06[00]. Hitin í gjár: 12,0°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 29/7 kl. 06[00]– 30/7 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juli: 73,0 mm

Atgongumerki til Miðlahúsið á ólavsøku

*Vinnararnir eru drignir.*

Ferð við Atlantsflog til Íslands
nr. 58

Ferð við Atlantsflog til Íslands
nr. 150

Gisting á Hotel Tórshavn eina nátt og døgurði fyri tvey
nr. 222

Skemtbøkurnar hjá Óla P
nr. 17

Sigið frá á telefon 341800, navn, adressa og telefon.

Sosialurin/ Miðlahúsið

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 22. juli | Fyrra kvarter |
| | Mánin longst frá jørðini |
| 30. juli | Fullmáni |
| 4. august | Mánin næstur jørðini |
| 5. august | Seinna kvarter |

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 31. Juli | 08.31 | 20.52 | 07.31 | 19.52 | 07.46 | 20.07 | 10.31 | 22.52 | 11.31 | 23.52 |
| 1. aug | 09.14 | 21.34 | 08.14 | 20.34 | 08.29 | 20.49 | 11.14 | 23.34 | - | 12.14 |
| 2. aug | 09.55 | 22.15 | 08.55 | 21.15 | 09.10 | 21.30 | 11.55 | - | 00.34 | 12.55 |
| 3. aug | 10.35 | 22.56 | 09.35 | 21.56 | 09.50 | 22.11 | 00.15 | 12.35 | 01.15 | 13.35 |
| 4. aug | 11.18 | 23.43 | 10.18 | 22.43 | 10.33 | 22.58 | 00.56 | 13.18 | 01.56 | 14.18 |

| Dagur | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 31. Juli | 06.46 | 19.07 | 05.46 | 18.07 | 08.46 | 21.07 | 09.46 | 22.07 | 08.16 | 20.37 | 09.31 | 21.52 |
| 1. aug | 07.29 | 19.49 | 06.29 | 18.49 | 09.29 | 21.49 | 10.29 | 22.49 | 08.59 | 21.19 | 10.14 | 22.34 |
| 2. aug | 08.10 | 20.30 | 07.10 | 19.30 | 10.10 | 22.30 | 11.10 | 23.30 | 09.40 | 22.00 | 10.55 | 23.15 |
| 3. aug | 08.50 | 21.11 | 07.50 | 20.11 | 10.50 | 23.11 | 11.50 | - | 10.20 | 22.41 | 11.35 | 23.56 |
| 4. aug | 09.33 | 21.58 | 08.33 | 20.58 | 11.33 | 23.58 | 00.11 | 12.33 | 11.03 | 23.28 | - | 12.18 |